"lutfals-valskipanina", at teir ikki somikið sum droyma at seta hana úr verk til frama fyri eina valskipan, sum minnir um hana í Danmark. Staðfestast kann tí, at USA ikki er landið fyri tey, sum trúgva uppá, at tann libertarianski ella tann grøni flokkurin skulu vinna forsetavalið. Hesi hava onga orsøk til at trúgva uppá sínar flokkar, og tá kann onkur spyrja seg sjálvan, hvat bleiv av tí amerikanska dreyminum, tí er tað nakað, sum tann amerikanski dreymurin leggur dent á, so er tað tað, at øll, og harumfarmt eisini tann einstaki, skulu hava møguleikan til eydnu.

## Amerikumenn tíma ikki á val, tí at demokratarnir og republikanarnir eru ov líkir

Sostatt er tað stutta av tí langa tað, at eg nokk hevði stuðlað einum av teimum smærru flokkunum her í USA, um eg hevði sloppið at valt, men møguleikin fyri at hesin flokkur hevði verið valdur, er somikið lítil, at eg nokk hevði skulað umhugsað at valt antin tann demokratiska ella tann republikanska flokkin, um eg ætlaði mær á val, og um eg væl at merkja hevði havt rætt til at farið á val her í San Diego, har eg eri staddur í skrivandi løtu. Síðan eg meti, at tað er at blaka mína atkvøðu burtur at atkvøða fyri tí republikanska ella tí demokratiska flokkinum, so hevði eg allarhelst neyvan farið á val, um eg hevði havt valrætt her, og um eg hevði verið noyddur at valt ímillum McCain ella Obama, og soleiðis munnu tað vera mangir amerikumenn, sum hugsa. Tað er soleiðis, at tað hevur í nógv ár verið siðvenja í USA, at valluttøkan er serstakliga lág, og hóast tað væl kann vera, at valluttøkan verður hægri hesuferð, so tori eg at gita, at hon framvegis ikki verður í námind eins høg, og vit eru von við frá teimum vesturevropeisku londunum.

Tað er ilt at koma við einari einfaldari frágreiðing uppá, hví so lutfalsliga fáir amerikumenn fara á val, men eg loyvi mær at gita, at tað er tí, at tá ið alt kemur til alt, so eru teir stóru flokkarnir ikki so ólíkir, sum summi munnu halda. Báðir flokkarnir vilja hava so nógvar veljarar sum gjørligt, og tað merkir, at báðir flokkarnir leita inn móti miðjuni politiskt sæð, tí tað er við at vera har, at teir kunnu vænta sær at fáa tær flestu atkvøðurnar. Tó so var valið í 2004 eitt undantak, tí



tá komu veljararnir á tí kristna konservativa veinginum at spæla ein avgerandi leiklut til fyrimunar fyri Bush forseta, eftirsum at Bush forseti hevði fiskað eftir atkvøðunum úti á tí, sum verður rópt "høgravongurin" í USA. So báðir flokkarnir fiska vanliga eftir teimum somu veljarunum, og hetta hava teir gjørt í mong ár, og av hesi orsøk koma teir at verða rættiliga líkir. Tá ið so annar av flokkunum vinnur valið og fær sítt forsetavaleni til valdið í teimum Hvítu Húsunum, so noyðist viðkomandi flokkur og tess forsetavaleni framvegis at hugsa um veljaran, í øllum førum í ein ávísan mun við tað at hesin flokkur og tess forsetavalevni ein dag skal stillast til svars fyri veljaran og svara fyri tað, hann hevur gjørt í teimum Hvítu Húsunum tey fýra árini, hann hevur sitið við valdinum, og av hesi orsøk kann viðkomandi flokkur og forsetavalevni tess ikki gera tað, sum teimum lystir, tí annars verða teir revsaðir av veljarunum, og hetta merkir, at teir missa veljararnar á miðjuni, sum heldur fara at velja hitt forsetavalevnið, og soleiðis gongur tað sum ein vindmylla áratíggju eftir áratíggju.

Alt hetta merkir, at teir stóru flokkarnir í USA mugu laga seg eftir teimum mongu veljarunum á miðjuni bæði undan vali og undir teimum fýra árunum, annar av flokkuinum/forsetavalevnum eventuelt situr við valdinum í teimum Hvítu Húsinum, og tískil kann tað tykjast fyri mongum, sum um at báðir flokkarnir eru rættiliga líkir, og hetta var eisini fatanin eg og mangir av mínum amerikonsku floksfeløgum her yviri fingu, tá ið vit sótu og hugdu at varaforsetasjónvar psdystinum millum Biden og Palin, og tá vit hugdu at triðja forsetasjónvarpsdystinum millum Obama og McCain. Á onkrum økjum var munur millum valevnini, men í tí stóra og tí heila kann eg ikki siga nakran vera ringan fyri, um hann ella hon helt, at valevnini, í øllum førum retoriskt sæð, vóru rættiliga lík, og tí vil eg pástanda, at hetta man vera orsøkin til, at nógvir amerikumenn heldur sita heima enn at fara á val, tí tað kann gera tað sama, hvønn tú velur, tí bæði valevnini eru rættiliga lík, og tað loysir seg ikki at velja eitt triðja valevni.

T.d. um vit hyggja at økjum, har bæði McCain og Obama eru líkir, so kann eg vísa á, at báðir tveir sita í Senatinum, og har atkvøddu báðir tveir fyri Bailout-ætlanini, sum í stuttum hevur til endamáls at bjarga nógvum av amerikonsku bankunum. Harvið vóru báðir jaligir fyri, at tann amerikanski staturin skuldi bjarga privatum bankum, og harvið kann man í hesum føri siga, at McCain ikki var longur til høgru enn Obama. Tað verður vanliga sagt í Føroyum, at republikanararnir eru teir høgrasinnaðu, meðan demokratarnir eru teir vinstasinnaðu, men í hesum føri var altso sum sagt eingin munur á valevnunum báðum. Eisini vil hvørgin av valevnunum báðum taka hermenninir heim úr Miðeystri. T.d. so vil Obama raðfesta øðrvísi enn Bush jr og flyta hermenn úr Irak til Afghanistan, so eingin kann koma og siga, at Obama er radikalt øðrvísi enn MCain og Bush á tí uttanríkispolitiska økinum, og at hann er ein friðarsinnaður "hippie", tí hann vil eins og republikanararnir raðfesta tað at hava hermenn í Miðeystri.

So tað stutta av tí langa er, at tú broytir einki amerikanskt samfelag við at fara á val, og eisini hetta er mikið spell, tí í einum samfelag, ið skal eitast at hava sum grundarlag at vera fólkaræðisligt, er tað ein mótsøgn, at veljarin ikki kennir seg at kunna broyta nakað við at nýta sín atkvøðurætt, ið jú vanliga verður nýttur til at broyta samfeløg við. Eisini her kann onkur spyrja seg, hvat bleiv av tí amerikanska dreyminum, ið jú leggur dent á eydnuna hjá tí einstaka og harvið rættin hjá tí einstaka til at avgera sína eydnu við at velja tað umboð, ið kann vera til frama fyri eins eydnu.

Hóast tað kann tykjast sum at spilla sína tíð at fara á forsetaval her yviri, so vil eg tó siga, at sjálvandi kann man altíð grundgeva fyri tí at fara á val orsakað av grundleggjandi fólkaræðisligum orsøkum. Um øll hugsaðu á tann hátt, at tað loysir seg ikki at fara á val, tí valevnini eru so lík, so hevði eingin farið á val, og so vil eg pástanda, at tann fólkaræðisliga skipanin, vit hava, skjótt hevði komið í eina vandastøðu, og hetta hevði sjálvandi ikki verið ein góð støða at komið sær í, tí er tað nakað, vit eiga at fjálga og seta prís uppá, so er tað tann fólkaræðisliga skipanin við møguleikanum fyri at fara á val av og á, og tí vil tað altíð vera ein hátíðardagur, tá val er, tí tað er tá, veljarin verður settur í hásæti og verður hoyrdur.

## Veljararnir vísa sína ónøgd við ikki at fara á val

Eg vil tískil pástanda, at tað er

